## Bretar seta ferðina niður



Í Bretlandi hava myndugleikarnir sett sær fyri, at í framtíðini skulu færri fólk lata lív í ferðsluvannlukkum. Eitt tiltak er at seta hámarksferðina niður. Eitt nú hevur stjórnin gjørt av, at á teimum sokallaðu A-vegunum sleppa bilar opg onnur akfør ikki at koyra meiri enn 75 kilometrar um tíman. Stjórnin væntar, at tann broytingin fer at hava við sær, at ferðsluvanlukkurnar á hesum vegunum verða ein triðing færri í framtíðini. Eitt annað tiltak er at gera serlig vegkort, har tað er viðmerkt, hvar tær flestu vanlukkurnar henda. Málið hjá myndugleikunum er at bjarga 10.000 undan ferðsludeyða tey næstu tíggju árini.

## Norðurlendsk børn trívast

Av øllum børnum í Evropa eru tað børnini í Niðurlondum og Norðurlondum, sum trívast best. Tað sæst í einari frágreiðing, sum bleiv almannakunngjørd í gjár. Av teimum 29 londunum, sum frágreiðingin umfatar, liggja Niðurlond á fyrsta plássi, á øðrum plássi er Svøríki, á triðja plássi Noreg, á fjórða plássi Ísland, og á teimum báðum næstu plássunum eru Finnland og Danmark. Tað mest hugvekjandi við frágreiðingini er kanska, at Bretland er í niðara endanum, men sambært Reuters kemst tað av, at har eru lutfalsliga nógv børn, sum hava arbeiðsleys foreldur, ið ikki hava nakað stórvegis til avlops.

## Tvistur um gardinur

**Verjin hjá tí 26 ára gamla legði stóran dent á, um gardinurnar vóru fult drignar fyri, ella um síggjast kundi inn í stovuna**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*

Løgreglan í Føroyum hevði boðsent serfrøðingum úr Danmark at gera brunatekniskar kanningar í sambandi við eldin í Hamarsgøtu í november í fjør.

Lars Sengebjerg frá Kriminalteknisk Center, brunadeildin, var eitt serfrøðingarvitni fyri ákæran, og hann greiddi frá teimum teknisku kanningunum í sambandi við eldin.

Hann kundi bara staðfesta tað, sum framman undan var eyðsýnt, nevniliga at eldurin varð ásettur við vindeygað við síðuna av úthurðini, og at hann síðani hevði breitt seg inn gjøgnum brotnað rútin til stovuna.

Bæði ákærin, Linda Hesselberg, og ákærin, Jógvan Páll Lassen, løgdu stóran dent á, um gardinurnar vóru drignar fyri ella ikki. Hetta hevði uttan iva við spurningin at gera, hvørt teir báðir ákærdu vistu ella kundu vita, um fólk var inni í húsunum ella ikki, tá teir settu eld á.

Revsingin er óhugnaliga nógv harðari, um ákærin kann prógva, at teir ákærdu ikki kundu vita, um fólk var inni ella ikki, tí tá gerst talan um morðbrand.

Serfrøðingurin hjá kriminalteknisk center kundi ikki við vissu siga, um gardinurnar í øllum vindeygum vóru drignar fult fyri, men tað var alt, sum bendi á, at so var.

Einar gardinur, sum bert vóru partvís brendar, vórðu lagdar fram í rættinum, og tað var rættiliga eyðsýnt, at var talan um hetta slagið av gardinum fyri øll vindeyguni, bar ikki til at síggja inn í húsini, vóru gardinurnar drignar fyri.

# – Mær dámar væl vold

**Tann 19 ára gamli, sum saman við einum 26 ára gomlum í Føroya Rætti stendur ákærdur fyri fleiri lógarbrot, dylur ikki fyri, at tá tað kemur til harðskap, hevur hann ongar »hemningar«**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Tann 19 ára gamli ákærdi í málinum um eldáseting í Hamarsgøtu dylir ikki fyri, at hann ongar hemningar hevur í sambandi við harðskap*

Tað eru nógvar og álvarsligar ákærur, sum tann 19 ára gamli nú stendur andlit til andlits við í Føroya Rætti. Og allar fimm ákærurnar snúgva seg um harðskap. Men tað er ikki heilt av tilvild.

- Mær dámar væl vold, og tá tað kemur til vold, havi eg ongar hemningar, segði tann 19 ára gamli bart út í rættinum í gjár.

Undir viðgerðini av ákæruni um eldáseting í Hamarsgøtu 2 varð fleiri ferðir nevnt, at tann 19 ára gamli skuldi havt tosað um eitt møguligt blóðbað, tá hann fór at krevja tær 500 krónurnar inn, sum genta tann órættaða skyldaði ákærda.

Sum tað nú hendi vísti tað seg eisini at gerast eitt sindur blóðugt, men helst ikki, sum ákærdi hevði roknað við. Tað var nevniliga vinmaður hins ákærda, sum fekk sár í pannuna av einum havasaksi, sum órættaði sambært ákærda leyp á við, men sum hann sambært ákæranum vardi seg við.

- Eg hugsaði um hevnd. Eg ætlaði at koma aftur, og tá skuldi tað blíva verri, bæði fyri (NN) og mammu hansara, greiddi ákærdi frá í rættinum eftir at tað miseydnaðist at fáa hendur á teimum 500 krónunum.

Mamman var komin á staðið, tá hendingin var mest sum av, men kortini fekk hon ein alboga í andlitið frá vinmanni til ákærda.

Ákærdi segði, at hetta var eitt álop, sum hann hevði planlagt fleiri vikur framman undan.

Í einum øðrum føri skuldi ein unglingi bukast, tí hann eftir øllum at døma hevði »hugt skeivt« upp á eina gentu. Tann hendingin endaði við eini ákæru um drápsroynd, tá ein vinmaður ákærda í bilinum hjá ákærda rendi á umrødda ungling, sum tó slapp ógvuliga væl frá hendingini.

# – Eg drepi teg og tína familju

**Í morgun hevur málið um bilstuldurin og fylgjandi hóttanirnar, sum tann 26 ára gamli setti fram móti løgreglumonnunum, verið fyri í Føroya Rætti**

RÆTTARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Dr. Jekyl og Mr. Hyde. Eins nógv, sum hin 26 ára gamli ákærdi var frá sær sjálvum við handtøkuna 9. mai í fjør, líka stillur og friðarligur hevur hann verið síðani, sambært løgreglumanni*

Ein ung kvinna í Miðvági vaknaði tíðliga á morgni av einum braki, sum skuldi vísa seg at vera eitt ferðsluóhapp. Hetta var eisini byrjanin til eina ákæru móti einum 26 ára gomlum manni, sum í hesum døgum stendur ákærdur í Føroya Rætti fyri fimm ymisk lógarbrot.

Í hesum førinum ljóðar ákæran upp á drápshóttanir móti fleiri løgreglumonnum.

Forsøgan er, at tann 26 ára gamli saman við tveimum vinmonnum stjólu ein bil uttan fyri Norðurlandahúsið 9. mai í fjør, og síðani koyrdu til Miðvágs. Har rendi tann 26 ára gamli á við bilinum, og tað var hetta, sum vakti ungu miðvágskvinnuna.

Hon ringdi til løgregluna og boðaði frá, og tá maðurin í bilinum ætlaði at taka til rýmingar, fór hon út at tosa við hann. Hann var tá bæði róligur og fittur at koma á tal við, og virkaði nervøsur um, hvat var hent við bilinum.

Kvinnan tosaði um leyst og fast við tann 26 ára gamla til lokali løgreglumaðurin kom á staðið. Sindur seinni kom eisini bilur úr Havn, og tað var tá, at tann 26 ára gamli gjørdist óður.

Teir báðir løgreglumenninir úr Havn vitnaðu báðir um, at tann 26 ára gamli vísti hóttandi atburð og yvirhøvur var hóttandi í orð og tal. So hóttandi, at teir báðir løgreglumenninir kendu seg noyddar at leggja ákærda í hondjørn.

Tá hevði ákærdi hótt við at sorla og sora og drepa, og hesum helt hann fram við, eftir at hann varð settur inn í løgreglubilin.

### Dr. Jekyl & Mr. Hyde

Annar av løgreglumonnun-